# “Svingom” í eldrasambýlinum

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og fyrrapartin turt, men seinnapartin møguliga regn. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Strúkur í vindi av landnyrðingi og eystri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

**Danskir tónleikarar hava ferðast í Føroyum og spælt fyri pensiónistum og øðrum góðum fólki**

ELDRADANSUR
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Danski tónleikarabólkurin »Gamle Venner« av Århusleiðini hevur seinastu dagarnar ferðast í Føroyum, og millum annað spælt tónleik fyri eldri føroyingum.

Mikudagin var bólkurin á eldrasambýlinum »Korndalsbýlinum« á Eiði.

Eini fimm musikarar undirhildu við sangi og spæli, og búfólkunum dámdi væl. Tey trallaðu og sungu, og onkur fór eisini upp á gólv og stutleikaði sær óført.

– Tað er nakað langt síðan, eg dansaði seinast, men stuttligt var tað at royna aftur, segði ein eldri kona, sum fleiri ferðir var runt á gólvinum hendan seinnapartin.

Í Danmark eru skipað sonevnd »lokalcenter«, har ymsir aktivitetir eru fyri pensiónistar av ymsum slagi. Bæði eldri og yngri, eins og heilsuviðgerð av ymsum slagi eisini fæst.

Eit av hesum lokalcentrum er Bjørnshøjcentret í Trige beint uttan fyri Århus.

Har hittust nakrir spælimenn einaferð og fóru til stuttleika at spæla fyri búfólkunum. Tað var væl dámt beinanveg, greiða teir frá. So væl, at teir komu aftur ferð eftir ferð.

Síðan eru teir vorðnir meira ella minni kendir í eldraumhvørvinum í Danmark og hava ferðast um landið og spælt á slíkum støðum.

Ein føroyingur, sum býr um Århusleiðina, hoyrdi bólkin einaferð herfyri og skipaði so fyri, at tey komu til Føroya ein túr í summar.

Tað, spælt verður, er so at siga bara gamlir »slagarar«. Slíkt, sum fólk kenna og duga at syngja við.



*Eldradansur í Korndalsbýlinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*


BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

Original bosal Útstoyt



p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjørður
Tlf. 444405
Fax444629


**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John’s | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 19 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 23 |
| Moskva | 29 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 26 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 23 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 35 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 36 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 15 |
| New York | 25 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 25 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst. 999 hPa. á 56N-33V fer spakuliga eystureftir og dýpist nakað.




Hátrýstið við Ísland stendur mestsum í stað, men viknar nakað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/07 kl. 06[00]– 19/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 10,0°
Minsti hiti máldur í juli 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 18/07 kl. 06[00]– 19/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 27,9 mm


Sera bíligt at LEIGA SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544


## VESTFALLSKYRRINDI

20. juli: Tendring - Økusól
21. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. juli | 06.52 | 19.19 | 05.52 | 18.19 | 06.07 | 18.34 | 08.52 | 21.19 | 09.52 | 22.19 | 05.07 | 17.34 | 04.07 | 16.34 | 07.07 | 19.34 | 08.07 | 20.34 | 06.37 | 19.04 | 07.52 | 20.19 |
| 21. juli | 07.48 | 20.17 | 06.48 | 19.17 | 07.03 | 19.32 | 09.48 | 22.17 | 10.48 | 23.17 | 06.03 | 18.32 | 05.03 | 17.32 | 08.03 | 20.32 | 09.03 | 21.32 | 07.33 | 20.02 | 08.48 | 21.17 |
| 22. juli | 08.47 | 21.18 | 07.47 | 20.18 | 08.02 | 20.33 | 10.47 | 23.18 | 11.47 | — | 07.02 | 19.33 | 06.02 | 18.33 | 09.02 | 21.33 | 10.02 | 22.33 | 08.32 | 21.03 | 09.47 | 22.18 |
| 23. juli | 09.45 | 22.12 | 08.45 | 21.12 | 09.00 | 21.27 | 11.45 | — | 00.18 | 12.45 | 08.00 | 20.27 | 07.00 | 19.27 | 10.00 | 22.27 | 11.00 | 23.27 | 09.30 | 21.57 | 10.45 | 23.12 |
| 24. juli | 10.37 | 23.02 | 09.37 | 22.02 | 09.52 | 22.17 | 00.12 | 12.37 | 01.12 | 13.37 | 08.52 | 21.17 | 07.52 | 20.17 | 10.52 | 23.17 | 11.52 | — | 10.22 | 22.47 | 11.37 | — |


